# Bíblian – ikki lesnaður fyri børn

A. GUTTORMUR DJURHUUS



Skelkandi kanningarúrslit
Í Dimmalætting fyri 21. august 2007, verður sagt frá tveimum ymiskum kanningum av føroyskum skúlaungdómi.

Onnur kanningin er sálarlig heilsukanning av øllum 8. flokkum í øllum fólkaskúlanum í Føroyum, og vísir hon, at fimti hvør næmingur er sálarliga sjúkur og hevur hjálp fyri neyðini.

Hin kanningin er um lesivanar hjá børnum úr 4. til 10. flokki í føroyska fólkaskúlanum, og vísir hon, at Bíblian og annar átrúnaðarligur lesnaður er høvuðslesnaðurin hjá hesum ungdómum.

Sanniliga eru hetta skelkandi kanningar, sum vísa, at her er okkurt sum ikki ruggar rætt. At her er okkurt, sum er farið av sporinum, og sum má fáast aftur á beint.

**Bíblian, ikki nøkur barnabók**

Tann, sum lesur Bíbliuna uttan fordóm, dugir skjótt at síggja, at hon er ótespiligur lesnaður og ikki er ein bók fyri viðbrekin børn. Full, sum hon er av hori og hópdrápi, drykkuskapi og blóðskemd, píning og neyðtøku og svik og hevnd.

Sjálvur havi eg ikki avmarkað lesnaðin hjá mínum egnu børnum, men um tað var komið til lesnað av Bíbliuni, hevði eg helst gjørt tað, tí at eg haldi, at hon er so rá og so sera óhóskandi lesnaður fyri viðkvæmar barnasálir. Vissuliga verður sagt, at børn duga at skilja millum fiktión og fakta, men í hesum førinum verður trúttað niður í barnið, at tað er sjálvur Gud hin altvaldandi, sum sigur frá. Ikki løgið, at barnið gerst ørkymlað og tungt í huga.

**Tvær sorgarhøgtíðir**

Sum smádrongur var eg í kirkju so at siga hvønn sunnudag. Mangan dagin fór eg hugtungur aftur úr kirkju. Serliga vóru tað tvær høgtíðir, sum eg óttaðist, og sum tungt var at koma ígjøgnum. Tað vóru jólini og páskirnar. Jólini, tí at tá varð sagt frá barnamorðunum í Betlahem. Tá øll dreingjabørn har í ávísum aldri vórðu myrd, tí at frelsarin var føddur. Søguliga er einki hald í søguni, men tað kundi eg ikki vita tá. Eg hugsaði um allar tær syrgjandi mammur, sum sótu grátandi eftir, tí at synir teirra vórðu tiknir frá teimum og myrdir. Og okkurt tárið rann niður eftir kjálkanum, men tað mátti dyljast, tí tað var skomm at gráta.

Páskirnar vóru eisini tungar at stríða seg ígjøgnum. At sita og hoyra um, hvussu Guds sonur varð plágaður og píndur til deyða var ikki nøkur jalig uppliving hjá einum viðbreknum barni.

Um tú hevur trúgv og tekur fyri fult tað, sum í Bíbliuni stendur, er tað ræðandi lesnaður og er lætt hjá viðbreknum barni at fáa skør í sálina av.

**Loystur úr hafti**

Ein maður segði mær, hvussu nógv glaðari hann gjørdist, tá hann hevði mist trúnna. Frammanundan hevði hann alla somlu tíðina eina kenslu av at verða eftiransaður av Gudi. At verða jagstraður. Sjálvt tá hann var á vesinum. Hann tordi ikki at fríggja og enn minni at onanera. Hann segði, hvussu tað lætnaði tá trúgvin var farin, og hann kundi fara undir at liva eitt vanligt lív. Tá kundi hann hugsa fúlar tankar uttan samvitskubit. Á denn lætti!

**Verða støðugt álopin av trúgvandi**

Ung genta hevur greitt mær frá, hvussu lærari hennara í kristnitímanum í barnaskúlanum loypti ræðslu á allan flokkin, tá hann greiddi teimum frá, hvussu dómadagur fór at vera. Nú er viðkomandi persónur sálarliga robustur og gjørdist úrslitið, at hon vendi sær frá kristindóminum. Men ikki er so við øllum. Summi fáa skelk fyri lívið.

Slíkir lærarar eru óegnaðir til frálæru í kristni, men tíverri er tað so, at summir av teimum síggja seg sjálvar sum Guds stríðsmenn og brúka skúlan sum pall at prædika sína egnu kriplaðu trúgv.

Í almenna rúminum, her hugsi eg serliga um okkara almenna útvarp, verður tú eisini alla somlu tíðina undirdiktur av kristiligari propagandu av missionerandi ørvitisknokkum, sum siga tær, hvat tú skalt halda og trúgva. Og eingin sigur ímóti. Eingin torir ella tímir at mæla ímóti fyri ikki at verða stigmatiseraður.

# Veljarin ynskir ikki eitt valdømi

JOHN WILLIAM JOENSEN
Norðoya Sambandsfelag



Í nógv umtalaðu veljarakanningini hjá gallup siga føroyingar heilt greitt noy til Føroyar, sum eitt valdømi - men Sosialurin hevur fingið annað burtur úr tølunum.

Hóast forsíðan á Sosialinum mikudagin 22. august vísir eitt kort, sum sigur at bert eru sandoyingar og suðuroyingar, sum ikki taka undir við einum valdømi - so siga tølini hjá Gallup greitt - at tað er bert miðøkið í landinum, sum tekur undir við at skipað Føroyar sum eitt valdømi.

Greinarøðin í Sosialinum kann bert tulkast sum propaganda til frama fyri Føroya sum eitt valdømi, tí hóast tað bert eru valdømini í Eysturoynni og Streymoynni sum taka undir við at skipa Føroyar sum eitt valdømi, so verður ein heilt annar boðskapur proklameraður á forsíðuni og inni í Sosialinum.

Kanningin hjá Gallup vísir, at veljarar í Norðoyggjum, Vágum, Suðuroy og Sandoy siga noy til eitt valdømi, meðan miðøkið (Streymoy og Eysturoy) siga ja.

Norðoyggjar noy
35% ja
38% noy
27% veit ikki

Eysturoy ja
59% ja
22% noy
19 veit ikki

Vágarnar noy
33% ja
41% noy
23% veit ikki

Suðuroy noy
38% ja
55% noy
8% veit ikki

Norðurstreymoy ja
57% ja
15% nei
27% veit ikki

Suðurstreymoy ja
72% ja
14% nei
14% veit

Sandoyggin noy
Ja 30%
Nei 48%
Veit ikki 22%

Tølini tala sín greiða boðskap

Viðmerking:

**Ganga ikki ørindi fyri nakran**

Seinastu tíðina hevur Sosialurin havt tvær søgur um hugburð føroyinga til eitt valdømi, grundað á Gallup-kanning. Onnur yvirskriftin var: Suðurføroyar kenna seg hóttar og hin var Føroyingar fyri einum valdømi.

At vit velja at vinkla yvirskriftirnar soleiðis, kemst stutt og greitt av, at hetta eru mest markantu niðurstøðurnar í kanningini.

Í greinini um at Suðurføroyar kenna seg hóttar, stendur longu í undiryvirskriftini, at kanningin eisini vísir: at tess nærri fólk eru at høvuðsstaðnum, tess meira eru fólk fyri einum valdømi. Sostatt er munurin millum tey sum siga ja og nei minni í Vágum og í Norðoyggjum, enn í miðstaðarøkinum.

Av tí, at so stórur partur av fólkunum í hesum landspørtum ikki hevur tikið støðu enn, hevði tað verið óseriøst at vinkla yvirskriftina uppá, at útjaðarin er ímóti einum valdømi, tí niðurstøðan har er als ikki greið, sum í Suðurføroyum.

Við at prenta úrslitini av kanningini hava vit júst lagt upp til, at fólk eisini kunnu gera sínar egnu niðurstøður, men journalistiskt skulu søgurnar sjálvandi vinklast.

# Sambandslótir
# Ein undarligur flokkur - undarligur flokspolitikkur

BIRGIR MOHR



Í meira enn trý ár hevur sambandsflokkurin umsitið fíggjar- og skattamál í Tiganesi.

Sambandsflokkurin hevur dúgliga lovprísa hesum góða politikki og frálíka fíggjarmálaráðharra sínum - og rætt skal vera rætt, av røttum, tí búskaparliga hevur verið framgongd hesi ár og stórur búskaparligur útviklingur í okkara samfelag.

Ein kann so siga, at tað ikki bert er fíggjarmálaráðharranum fyri at takka. Gaman í, men var tað øvugta hent, at tað hevði gingið aftureftir búskaparliga, so hevði fíggjarmálaráðharrin fingið høvuðsskuldina - tí eigur hann høvuðsæruna fyri góðu gongdina.

Ein partur av hesum útviklingi og hesi búskapargongd er skattalættin, sum samgongan og sambandsflokkurin harvið hava latið føroya fólki og sum sambandsins fíggjarmálaráðharri hevur biðið løgtingið viðtaka. Men nú kemur ein nýggjur fíggjarmálaráðharri úr sama sambandsflokkinum og fortelur okkum, at politikkurin var skeivur, sum flokkur hansara og partamaðurin hava ført og sett út í kortið? Er tað ikki undarligt? Trúvirði floksins?

At skattalættin var illa fordeildur millum inntøkubólkarnar skal her vera kvittað fyri, men um hann prinsipielt var skeivur, tað ivist eg í, tó eg var umhugsin í frammanundan. Men at sami flokkur kann báði reypa sær av brøgdunum hjá Bári Nielsen og samstundis taka fult undir við Magna Laksafoss, tað meira enn undrar. Og at Sambandsflokkurin nú - fyri at rætta upp á sín egna skatta- og fíggjarpolitikk - loypir frá samgonguavtaluni um Sandoyartunnilin, tað er átalu vert, tí samgonguskjalið hevur verði til í skjótt 4 ár; hvar er trúvirðið?

Hvat er so galið við búskapinum? Yvirupphiting? Av hvørjum er hon komin og hvussu kann hon loysast? Eitt úrslit av góðu inntøku føroyinga og góðu lánimøguleikum okkara hevur ført við sær, at innflutningurin er vaksin skjótari enn útflutningurin, tí okkara forbrúk er stórt - kanska ov stórt. Men hvat kann sandoyartunnilin bøta her um? Lítið og einki. Tí hann verður gjørdur av maskinum og tólum - fáum monnum, og bert krútið verður innflutt, alt hitt er her frammanundan.

Hattar er ikki loysnin - skalt tú lætta um trýstið á handilsjavnaðinum og víðari á gjaldsjavnaðin, so mást tú antin minka innflutningin ella vaksa útflutningin. Tað gerst ikki við at útseta Sandoyartunnilin - og tað gerst als ikki við at flyta peningin til alment forbrúk, sum nú hoyrist. Men torir Sambandsflokkurin og fíggjarmálaráðharri hansara at gera tað, sum neyðugt møguliga er, at tálma innflutninginum? Tað er spurningurin, tí tað rakrar eisini miðøkið, sum er fríðhalga av Sambandsflokkinum? Tó ymiskir møguleikar eru.

Tað skal neyvan tað stóra inntrivið til, men torir Sambandsflokkurin og løgtingið tað nú beint áðrenn valið? Tað fáa vit at síggja. Tað er skeivt at útseta Sandoyartunnilin og betranina av undirstøðukervinum og tað bjargar ikki búskapinum. Er alt bert lótir?

SO280807xx.indd 13 28-08-2007 12.18.55